## Best at eta tvøst

Norskir hvalaveiðimenn mæla nú fólki til at eta tvøst heldur enn neytakjøt, tí tað er betur fyri umhvørvið. Hvalaveiðimenninir vísa á, at sambært kanningum er tvøst tað kjøt, sum letur minst $CO_2$ út í luftina í sambandi við framleiðsluna. Berlingske Tidende skrivar, at fyri hvørt kilo av tvøsti, sum verður brúkt til mannaføði, fer 1,9 kilo av $CO_2$ út í luftina, men er talan um eitt kilo av neytakjøti, fara heili 15,8 kilo av $CO_2$ út í luftina.



*Nýggja slagorðið: -Etið tvøst og bjargið heiminum*
*(Mynd: Morgunblaðið)*

## Íleggjarar ivast

Áhugin fyri at leita eftir diamantum í Grønlandi er stórur, men nú eru íleggjarar farnir at ivast í, hvussu góð útlitini fyri at finna nakað nevnivert veruliga eru. Kanadiska felagið Hudson Resources boðaði í síðstu viku frá, at felagið hevði funnið diamantar í rímiligum nøgdum við Kangerlussuaq, men kortini fall virðið á partabrøvum felagsins. Íleggjararnir siga sambært KNR, at teir kenna seg ikki vísar í, at kanningarúrslitið er nóg gott.

# Koma longri sum sjálvstøðug

**Sjálvur trúgvi eg, at høvdu vit havt tikið ábyrgd av øllum samfelagnum fyrr, høvdu vit eisini ligið millum hini grannalondini í dag. Tað ivist eg ikki í, sigur Karsten Hansen um ratingina hjá Moody's**

RATING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, var fegin um plaseringina, sum metingin hjá Moody's gav Føroyum, men spurningurin er, um hetta er nóg gott, tá hini Norðanlondini eru bólkað ovast á ratinglistanum.

- Eg vildi sjálvandi yngst, at vit eisini lógu á einum fyrsta plássi, men tá skal eisini verða sagt, at hyggja vit eftir, hvussu gongdin hevur verið síðani kreppuna, so haldi eg, at tað er heilt fantastiskt, at vit nú eru vektað á einum triðja plássi út av 21, sigur Karsten Hansen.

Og hetta ljóðar jú ikki so galið, so hvussu er fíggjarmálaráðharrin nøgdur við hesa metingina.

- Eg eri væl nøgdur. Hetta gevur okkum mót og eggjar okkum til at halda áfram soleiðis, at vit koma at standa javnbjóðis við okkara grannar, sigur hann.

Men tað er eingin loyna, at tann sannroynd, at vit eru í einum ríkisfelagsskapi við Danmark, lyftir okkum tvey stig uppeftir listanum.

- Tað er meira ein staðfesting av, hvussu teir síggja tað. Vit hava jú í nógv ár livað undir hesi skipan, og eg haldi tað er gott, at teir eru komnir til ta niðurstøðu, at vit einans høvdu fallið tvey stig niður, vóru vit ikki saman við Danmark. Sjálvur trúgvi eg, at høvdu vit havt tikið ábyrgd av øllum samfelagnum fyrr, høvdu vit eisini ligið millum hini grannalondini í dag. Tað ivist eg ikki í, sigur Karsten Hansen.



*Karsten Hansen er fegin um ratingina, sum Føroyar hava fingið frá Moody's, men heldur, at høvdu vit tikið fulla ábyrgd fyri øllum samfelagnum fyrr, høvdu vit verið komnir longri fram á leið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Fíggjarliga ábyrgd

Men tað merkir, at uttan donsku ríkisveitingina, lógu Føroyar á einum fimta plássi, og tað gevur verri lánimøguleikar, verri kredittmeting og dýrari lán, og tað er nakað, vit mugu fyrihalda okkum til.

- Vit mugu sjálvandi fyrihalda okkum til ta ratingina vit hava fingið, tí tað er hendan ratingin, ið grannalondini og heimurin lesur. Ratingin er gjørd eftir sama leisti sum hjá øllum øðrum heimsins londum, og teir hava lagt eina ávísa tyngd í, at vit eru í einum ríkisfelagsskapi. Vit fáa ikki fulla sannleikan at vita, fyrr enn vit eru leys av ríkisveitingini, og hava tikið fulla ábyrgd av samfelagnum, sigur Karsten Hansen.

Fíggjarmálaráðharrin vísir á, at í avtaluni frá 1998 millum donsku og føroysku stjórnina, sum eisini er samtykt í løgtinginum, verður staðfest, at føroyingar hava fulla ábyrgd av fíggjarligu viðurskiftunum í Føroyum.

Moody's ger hesar metingar javnan, og teir fylgja støðugt gongdini í øllum teimum londunum og øllum teimum fyritøkum, teir rata. Um einki óvanligt og drastiskt hendir, senda teir út nýggjar ratingar við hálvum øðrum til tvey ára millumbili. Og hvat málið er fyri næstu ratingini, ivast fíggjarmálaráðharrin ikki í.

- Tað er sjálvandi ringt at spáa um framtíðina, men málið er at flyta okkum upp frá har, vit eru móti har, sum grannatjóðirnar eru. At havt nakað annað sum mál hevði verið púra burturvið, sigur Karsten Hansen.

# Góða ávirkan á búskapin

**At Føroyar eru rataðar á triðja plássi á ratinglistanum fer at hava eina positiva ávirkan á búskapin. Men tað fer at verða tungt at flyta seg hægri upp á listanum, heldur Sigurð Poulsen, landsbankastjóri**

RATING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Góða ratingin, sum Føroyar hava fingið frá Moody's, hevur fleiri positiv árin við sær. Eitt av hesum er áhugin í lánsbrøvunum hjá landsstýrinum.

- Tað fer í høvuðsheitinum at merkjast á tann hátt, at tað verða fleiri íleggjarar, sum kunna hava áhuga í lánsbrøvunum hjá landsstýrinum, segði Sigurð Poulsen við Rás2.

Ratingin hevur eisini ávirkan á kostnaðin hjá landinum, at fara út í heim at lána pening.

- Vit hava gjørt eina meting síðani vit fingu at vita, hvør ratingin fór at verða og eru komnir til, at hendan ratingin á triðja plássi kann gera, at rentan fer at lækka 0,2%, og merkir so tað, at rentan fer at liggja umleið 0,2% undir tað, tey hægst rataðu londini fáa, sigur Sigurð Poulsen.

Sumført hevur verið fram, er ein partur av góðu ratingini grundaður á, at Føroyar eru í ríkisfelagsskapi við Danmark, og tað hevur eisini týdning tann positiva vegin í metingini.

- Uttan hesa ratingina hevði kostnaðurin verið á tí støði, ið vit høvdu fingið sum sjálvstøðug tjóð, altso á einum 5. plássi. Og hesi tvey plássini upp eftir listanum gera, at fleiri íleggjarar eru áhugaðir í lánsbrøvunum hjá landsstýrinum, sigur Sigurð Poulsen.

### Sæst aftur í gerandisdegnum

Men eitt er, at landið fær fíggjarligar fyrimunir av hesi ratingini hjá Moody's, spurningurin er bara, hvussu hetta fer at síggjast aftur í gerandisdegnum.

- Ein av fyrimununum av hesi ratingini er, at stórar fyritøkur, sum gera seg galdandi í Føroyum og uttanlands, lættari kunnu fáa fígging, og harvið eisini bíligari fígging, sum so aftur merkir, at tær gerast betri kappingarførar. Hetta merkir, at tað fer at stuðla undir búskapinum í Føroyum. Tað verður tó neyðugt hjá fyritøkunum at kunna útnytta tan fyrimunin, so tað fer at taka langa tíð, áðrenn hetta sæst aftur í búskapinum, sigur Sigurð Poulsen.

Og júst innan útflutningsvinnuna er týdningarmikið, at vit menna okkum.

- Eitt av teimum tiltøkunum, sum skulu til, fyri at bøta um okkara rating, er at bera so í bandi, at sveiggini í búskapinum verða minni enn tey hava verið, og tað sum best kann verða við til at minka sveiggini, er at vit fáa tænastufyritøkur, sum flyta út, sigur landsbankastjórin.

Sambært Karsteni Hansen er málið at náa upp á bestu rating, men tað verður



*Sigurð Poulsen, landsbankastjóri, væntar, at nýggja ratingin hjá Føroyum kann fáa positiva ávirkan á búskapin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

eitt tungt stig at taka, væntar landsbankastjórin.

- Tað er eitt nokk so stórt stig. Teir siga, at útlitini í tí ratingini, vit hava fingð, eru stabil, tí er tað munandi viðurskifti, sum skulu til fyri at broyta, bæði tann góða vegin og tann ringa vegin, segði Sigurð Poulsen við Rás2.